# Stan hersetti Føroy

**Stan Suggate var ein av hermonnunum, sum varð sendur til Føroya undir krígnum. Stan fann sær konu í Føroyum, og herfyri vitjaði tann 88 ára gamli bretin aftur í Føroyum. Hann minnist enn drápuligu sjónina, tá ið teir sigldu inn á eina blóðdálkaða Miðvág**



Her síggja vit ensku gestirnar: F.v. Graham, Catherine, Zena, John, Stan sjálvur, Charles og Josie

## Krígsminni



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

Tá ið Týskland hersetti Danmark 9. apríl 1940, vóru bretar skjótir at herseta Føroyar. Tað vóru kanska ymsar meiningar um hetta tá, men tá týsku illgerðirnar rættuliga komu fram, gjørdust føroyingar meira enn takksamir fyri, at bretar bjargaðu okkum undan tí, sum var nógv verri.

Tað er nógv skrivað um hesa tíðina, serliga av Niels Juul Arge. Men tað eru framvegis nógvar livandi "søgubøkur", sum eisini kunnu greiða frá hesi tíðini.

Her er serliga talan um teir bretsku hermenninar, sum fingu sær føroyska konu, og so eisini konurnar sjálvar.

Nakrir búsettust í Føroyum, men teir flestu fluttu við konunum til Bretlands. Tað er vanliga fatanin, at hesar konur yvirhøvur komu væl fyri.

Talið av hesum hjúnum eru sjálvsagt við at fækkast. Men í summar hava vit hitt tvær av hesum søgunum. Í juni høvdu vit eitt prát við Jóhonnu f. Apol, sum giftist við Harry Wilson. Teirra søga kemur seinni í heyst í Miðvikuna.

Nú um dagarnar hittu vit 88 ára gamla Stan Suggate, sum giftist við Kristionnu Petersen á Steig í Sandavági. Hon doyði fyri nøkrum árum síðani, 84 ára gomul. Men nú var Stan komin higar saman við sínum trimum synum og teirra konum at vitja.

Vit hittu Stan og fingu hansara søgu, sum eisini er eitt áhugavert íkast til søguna um hesa tíðini.

### Var við í krígnum frá byrjan av

Bert ein mánaða eftir at Ongland fór í kríggj móti Týsklandi, varð Stan 20 ára gamal innkallaður í herin í oktober 1939. Hann bleiv settur í tænastu í eini sjúkrahúseind, nevnd Ninth Field Hospital, sum skuldi virka sum sjúkrahús á hermótunum. Fyrsta tíðin gekk við venjingum í Onglandi. Á sumri 1940 varð eindin hjá Stan knýtt at Royal Marines, og vóru teir sendir við skipi í kríggj. Stan var umborð á herskipinum í einar tríggjar mánaðir. Ætlanir vóru um, at tann partur av flotanum, har hann var við, skuldi gera innrás í Vestur Afrika, men henda ætlan var av eini orsøk ella aðrari slept, og skipið fór tá til Glasgow í Skotlandi við hermonnunum. Hermenninir fingu tá frí í tríggjar vikur, og Stan setti kós heim til foreldrini í London, men har væntaði honum ein skelkandi sjón.

### Pápin var bumbaður

Heima í London høvdu tey veruliga merkt meira til kríggið, enn Stan hevði merkt umborð á troppaskipinum.

Foreldrini búðu í einum dupulthúsum í útkantinum av London, har tvær familjur búðu. Hesi húsini vórðu bumbað í sor av týskarum, tá hesir byrjaðu sín "blitz" bumbing ímóti Bretlandi og eisini London.

Tvey fólk í hinum partinum av húsunum vórðu dripin. Mamman slapp heilt óskalað, tí hon var í einum bumbuskýli. Verri kundi tað havt verið við pápanum. Hann var farin í skýlið, men var forvitin eftir at frætta tíðindini í útvarpinum og fer inn at lurta. Beint tá kemur ein bumba, sum rakar húsið, men her var pápin so heppin, at eitt billiardborð stóð millum hann og bumbuna, og tað bjargaði honum.

Tá ið Stan kemur aftur út flotanum, fer hann til hús, men hann finnur einki hús. So at leita eftir foreldrunum, men eingin kundi svara, hvar tey vóru. Hann fer inn í ráðhúsið at spyrja, men har vita tey heldur ikki. Men júst sum hann stendur uttanfyri ráðhúsið og hugsar um, hvat ið er at gera, sær hann pápan. Tá eru tey bráfengis flutt inn í eini hús har nærindis.

Húsini vórðu bygd upp aftur, og tað er her Stan og Kristianna hava búð meginpartin av tíðini. Tað er bert hálvur tími við toki inn í miðbýin í London.

### Sigldu seg inn í blóð!

Tá ið Stan fer aftur í herin eftir hesar tríggjar frívikurnar, fekk hann støð í Skotlandi, har hann skuldi bíða eftir nærri boðum. Hesa tíðina búðu og vandu teir ymsastaðni í Skotlandi. Ein dagin fáa teir boð um at fara umborð á eina av teimum skjóttgangandi fergunum, sum annars sigldu rutu til Isle of Man, sum liggur í írska havinum. Tá er tað, at teir koma til Føroyar, sum teir lítið og einki vistu um frammanundan.



Foreldrini hjá Kristionnu, Anna og Óla Jákup Petersen

Stan kom higar í apríl 1942, og komu teir inn á Miðvág. Hansara fyrsta minni var rættuliga drápuligt. Tá ið teir komu inn móti bryggjuni er sjógvurin reyður sum blóð og hermenninir ógvast við. Tá hevði júst verið grindadráp!

### Gjørdist laborantur í Sandavági

Stan kom higar saman við teirri